## Claus um trúgv

- Eg gangi ikki í kirkju hvønn sunnudag, men eg virði átrúna. Yngsti sonurin gongur í adventistaskúlan. Tað er eisini tí, at mær dámar væl, at fólk hava góð virðir. Tað eru nógv religiøs fólk í Føroyum, og tað er heilt í ordan við mær



## Claus um føroyskan ítrótt

- Føroyingar hava satsað ov nógv uppá fótbólt. Tit hava størri kjans at gera tykkum galdandi í altjóða kappingum í hondbólti. Eg vildi sagt, at føroyingar hava størri kjans at koma á støði við íslendingar í hondbólti enn í fótbólti

# us at tosa føroyskt



*- Tað kann sjálvandi vera torført at siga, hvat er heima. Eg eri dani, og Guðrun er føroysk, og vit hava búð bæði í Føroyum og Danmark. Beint nú búgva vit í Føroyum, og vit føla, at Føroyar er okkara heim. Kortini gleði eg meg ótrúliga nógv til at fara í summarfrí í Danmark, sigur Claus Rasmussen. Mynd: Jens Kr. Vang*

hondbólt. Strandingar hava spælt skjótan, tekniskan hondbólt, og tað er eisini tað, sum eg vil hava mítt lið at gera, sigur Claus, sum vónar, at fleiri ungir leikarar fara at banka uppá fyrsta liðið.

- Eg vóni, at teir ungu leikararnir koma at trýsta teir eldru. Eg ætli mær ikki at nýta teir somu 12 leikararnar alt árið. Um teir ungu leikararnir vísa viljan til at menna seg, kann eg hjálpa teimum at gerast betri leikarar, sigur Claus.

### Dani skal styrkja um liðið

Claus tekur ein danskan spælstýrara við til Føroya, sum skal styrkja um liðið. Talan er um Danni Syhler, sum fyrr hevur spælt undir Claus.

- Danni fer at hava stóran týdning fyri liðið. Hann er ein "allround" leikari, sum dugir at skora mál sjálvur, men hann ger eisini hinar betri. Hann vil geva hinum leikarunum nógv við sínum royndum, sigur Claus.

### Donsk feløg sýna áhuga

Claus ætlar ikki at vera venjari hjá StÍF í meira enn 3 ár. Fyribils er sáttmáli skrivaður fyri eitt ár. Eftir hetta eru fleiri møguleikar.

- Eg taki fleiri venjaraskeið, og eg ætli mær at halda fram við hesum. Fleiri donsk feløg hava spurt seg fyri, men beint nú hugsi eg einans um StÍF. Men í framtíðini fari eg møguliga at venja okkurt danskt felag. Eg fari helst serliga at venja unglingar, tí at mær dámar best at arbeiða við ungum leikarum, sum kunnu mennast, sigur Claus.

Claus og familjan fara helst at flyta aftur til Danmarkar einaferð, men tey kenna seg líka nógv heima í Føroyum, sum í Danmark.

- Tað kann sjálvandi vera torført at siga, hvat er heima. Eg eri dani, og Guðrun er føroysk, og vit hava búð bæði í Føroyum og Danmark. Beint nú búgva vit í Føroyum, og vit føla, at Føroyar er okkara heim. Kortini gleði eg meg ótrúliga nógv til at fara í summarfrí í Danmark, sigur Claus.

Tosar føroyskt

Nógvir danskarar hava trupult við at tosa føroyskt, hóast teir hava búð nógv ár í Føroyum. Claus tosar tó føroyskt, og hóast tú hoyrir, at hann er dani, so klárar hann seg heilt væl.

- Eg dugi ikki heilt at benda, men eg royni at tosa føroyskt. Eg gangi eisini høgt uppí, at børnini duga at tosa føroyskt, sigur Claus, sum var noyddur at læra seg føroyskt, tá ið hann var til skips.

- Eg sigldi við Venus, og føroyingarnir umborð vildu ikki tosa við meg, um eg tosaði danskt. Hetta var sjálvandi skemt frá teirra síðu, men tað noyddi meg so at royna at tosa føroyskt, og síðani havi eg roynt, sigur Claus.

## Fakta

**Navn:** Claus Rasmussen
**Føddur:** 4. mars 1961
**Maki:** Giftur við Guðrun Horn
**Familja:** Eiga børnini Kára, Elsu og Teis
**Arbeiði:** Pedagogur
Venjari hjá StÍF